## B68 nýggjan formann

Niclas Davidsen takkaði leygardagin fyri seg sum formaður í Tofta Ítróttarfelag. Niclas hevur verið formaður í 25 ár í felagnum, men nú er hann valdur í nevndina í FSF og leggur tí frá sær í B68. Nýggjur formaður í B68 er Jógvan Højgaard. Hinir nevndarlimirnir eru Ólavrur Jensen, Herman Jacobsen, Jóan Símun Saltá og Jan Andersen.

Jógvan Højgaard hevur drúgvar royndir sum nevndarlimur í Tofta Ítróttarfelag. Hann var í nevndini í 10 ár - frá 1993 til 2003. Øll árini var hann næstformaður.




*Mynd: www.b68.fo*

## Ronaldo heita móttøku

Brasilski álopsspælarin Ronaldo spældi um vikuskiftið fyri fyrstu ferð ímóti sínum gamla felagi, Inter, eftir at hann skifti til AC Milan. Ronaldo fekk góða byrjan, spældi væl í fyrra hálvleiki og legði Milan á odda 1-0. Í seinna hálvleiki var tað tó oddaliðið í Seriu A, Inter, sum stóð fyri tí mesta, og Inter skoraði tey bæði málini, sum vórðu neyðug fyri at venda dystinum.




*Fleyr var væl við í fyrstu setti, sum ÍF tó vann. Eftir hetta koyrdi ÍF dystin heim, og við sigrinum hava teir nú tryggjað sær meistaraheitið*

ÍF-Fleyr 3-0 (25-23, 25-19, 25-17)

# ÍF vann meistaraheitið

**ÍF tryggjaði sær føroyameistaraheitið í meistaradeildini hjá monnum sunnudagin, tá ið teir vunnu ímóti Fleyr í høllini á Kambsdali. Fleyr var væl við í fyrsta setti, men at enda var slett eingin ivi um úrslitið**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

ÍF og Mjølnir hava ligið og kappast um fremsta plássið í meistaradeildini hjá monnum í at kalla alt ár, men ÍF hevur tó verið liðið, sum hevur havt munin. Teir hava verið eitt vet frammanfyri Mjølnir so at siga allan vegin, og í seinasta umfari tóku teir eitt avgerandi fet ímóti meistaraheitinum, tá teir vunnu toppdystinum ímóti Mjølni í Klaksvík.

Sunnudagin skuldi ÍF so aftur í dyst, tá teir tóku ímóti Fleyr í høllini á Kambsdali. Her var greitt undan dystinum, at ÍF við einum sigri kundi tryggja sær meistaraheitið.

### Fleyr blakaði leiðslu vekk

Í fyrsta setti var annars einki, sum bendi á, at ÍF fór at fáa nakran lættan dyst ímóti Fleyr, sum liggur á einum fjórða plássi í meistaradeildini hjá monnum. Fyrstu løtuna fylgdust liðini væl, og munurin var ikki tann heilt stóri, men brádliga tók Fleyr dik á seg. Teir vunnu nakrar bóltar á rað, og so vóru tað brádliga teir, sum høvdu lagt seg rættiliga trygt á odda ímóti oddaliðnum.

ÍF royndi at koma innaftur í hetta settið, men illa gekst. Fleyr vísti betra spælið hesa løtuna, og alt bendi á, at teir fóru at vinna fyrsta setti á Kambsdali. Fuglfirðingarnir vildu tó ikki gevast. Teir bardust til síðsta bólt, og spakuliga byrjaðu teir at eta meir og meir av leiðsluni hjá Fleyr. Nú var tað ÍF, sum var oman á á vøllinum, og móti endanum av settinum fingu teir eisini Fleyr aftur, og so var liðugt hjá havnarliðnum. ÍF vann settið 25-23, sjálvt um Fleyr var á odda so at siga allan vegin.

### Hanus servaði settið heim

Í øðrum setti var gongdin á leið tann sama. Eisini her fylgdust liðini fyrstu løtuna, men so við og við tók Fleyr yvir. Teir vunnu sær eina fitta leiðslu, men hesaferð var leiðslan tó ikki líka trygg, sum hon var í fyrsa setti.

ÍF vildi tó ikki geva skarvin yvir. Teir blivu við at kempa, og seint í settinum fór Hanus Eliasen, sum spældi í staðin fyri Boban Ilic, sum var úti við skaða, at serva við støðuna 19-17 til Fleyr. Hann servaði ein bólt fyri og annan eftir, og hvørja ferð megnaði ÍF at vinna bóltarnar. Hanus gjørdi ikki mætari enn at serva settið heim, og so vann ÍF annað sett 25-19, sjálvt um Fleyr enn einaferð hevði verið oman á.

### ÍF tryggjaði sær sigurin

Hevði Fleyr verið væl við í fyrsta og øðrum setti, so var heilt annað flog yvir liðnum hjá ÍF í triðja setti. Nú vísti ÍF seg at spæla nógv tryggari, og teir høvdu helst eisini spælt nervarnar av sær, eftir at teir vóru komnir á odda 2-0 í settum.

ÍF setti seg á triðja sett mest sum alt fyri eitt, og teir vunnu sær eina lítlu leiðslu tíðliga í settinum. So við og við øktu teir bara meir um munin, og skjótt gjørdist greitt, at hetta settið fór ÍF at vinna.

Atenda førdu fuglfirðingarnir stórt, og ákoðararnir blivu bara meira og meira spentir, men brádliga steðgaði upp hjá ÍF. Teir høvdu vunnið sær dystarbólt, men teir høvdu stórar trupulleikar við at fáa síðsta bóltin í gólvið hjá Fleyr. Fleyr megnaði at vinna fleiri bóltar á rað, men ordiliga spennandi bleiv tað tó ikki. At enda kundi Jan Áki H. Olsen langa síðsta bóltin í gólvið hjá Fleyr, og so var rómurin stórur í høllini á Kambsdali. ÍF hevði vunnið ein at enda tryggan sigur á Fleyr, og við sigrinum var meistaraheitið nú í hús.

Sum heild má sigast, at meistaraheitið hjá fuglfirðingum er uppiborið. Teir hava verið á odda alla kappingini, og samanumtikið hava teir helst eisini verið liðið, sum hava havt mest stabilu avrikini.

ÍF-TB 3-1 (22-25, 25-13, 25-19, 25-18)

## ÍF heldur oddasessin

**ÍF vann ein tryggan sigur í meistaradeildini hjá kvinnum, tá tær høvdu vitjan av TB. Við sigrinum halda tær fast um oddasessin í bestu kvinnudeildini**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Sunnudagin hevði besta kvinnuliðið hjá ÍF í flogbólti vitjan av TB., og undan dystinum var greitt, at ÍF kundi endurvinna oddasessin frá SÍ, um tær vunnu dystin á gestunum av Tvøroyri.

TB fekk tó betru byrjanina uppá dystin. Munurin var ikki tann stóri í fyrsta setti, men her megnaði TB at draga longra stráið. Tær vunnu nevniliga hetta settið 25-22, og so høvdu tær fingið eina dreymabyrjan ímóti oddaliðnum.

Eftir hetta var tó eingin slingur í ÍF-valsinum. Í øðrum setti var stórur munur á liðunum, og ÍF vann sær eina trygga leiðslu mest sum alt fyri eitt. At enda vunnu tær ein knúsandi 25-13 sigur í hesum settinum, og nú vóru tær komnar í gongd.

Í triðja setti var tað aftur ÍF, sum kom betur frá byrjan. Tær vunnu sær eina rættiliga trygga leiðslu, og at enda vunnu tær eisini hetta settið 25-19.

Nú var tað ÍF, sum var á odda, og í fjórða setti settu tær alt uppá pláss. Her vunnu tær enn einaferð trygt, 25-18, og við sigrinum hava tær endurvunnið oddasessin frá SÍ.